Kyrie og Gloria eru tvey av teimum elstu liturgisku liðunum í kristnu messuni. *Kyrie eleison* á føroyskum *Harri miskunna okkum*, er at finna bæði í GT (Sl 25, 16 og 26,11) og í NT (Matt 9,27 og Luk 18,38). Álvarin í messuni og at vit hava miskunn fyri neyðini hevur frá fyrstantíð verið inngangur. Seinni í tíðini bleiv kyrie liðið 9-deilt – tríggjar ferðir *Kyrie eleison*, tríggjar ferðir *Christe eleison* og so aftur tríggjar ferðir Kyrie eleison. Kyrie kann syngjast við nógvum ymiskum messutónum; sum litani (vekselsangur) ella lesast.

Greitt skifti er i messuni frá Kyrie til næsta lið, Gloria. Hetta eru einglanir, sum kvóðu jólanátt (Luk 2, 14) *Gloria in exelsis Deo* (latínska umsetingin) *Heiður veri Guði á hægsta himni*.
*Gloria in exelsis Deo* verður vanliga rópt: Hin stóra doksologiin. Lítla doksologiin, verður oftast lisin eftir at ein Dávidssálmur er lisin: *Gloria Patri et Filio et Spiritui Sancto, sicut erat in principio, et nunc et semper, et in saecula saeculorum. Amen*, á føroyskum: *Æraður veri faðurin og sonurin og heilagi andi, sum tað var í upphavi, so nú og altíð og um allar ævir! Amen.* Longu 2. øld er ein hymna, sum byggir á hendan tekstin. Hann verður umyrktur í 4. øld, men ikki fyrr enn í 11. øld verður hann fastur partur av rómverjsku messuni. Hann varð tó ikki sungin í advent, føstu og langafríggjadag.

Fara vit aftur til reformatiónstíðina so var tað ikki ætlanin hjá Luther at gera umfatandi broytingar í sjálvari liturgiuni. Hansara fyrsta uppskot til eina nýggja guðstænastuskipan Formula Missae, sum kom í 1523 var á ongan hátt ein stór uppgerð við katólsku messuna. Hendan guðstænastuskipanin líkist nógv katólsku messuni, men var snikkað soleiðis til, at hon helt seg til nýggju læruna hjá Luther, t.d. vóru øll halgimenni og dyrkan av teimum tikin úr messuni.

Longu trý ár seinni, í 1526, kemur guðstænastuskipanin *Deutsche Messe*, har Luther skiftir katólsku messuliðini út við týskar sálmar, men Kyrie-og Gloria-liðini skula framvegis syngjast á ávíkavist griskum og á latíni. Tó fær Gloria-liðið hymnuna knýtt æt sær, nú í nýggjari týskari umyrking "*Allein Gott in der Hoh sey Ehr*" á føroyskum: *Tær, Guð, sum ein ræður himni á* (nr 16 í sálmabókini í týðing hjá J. Dahl). Traditiónin bleiv at 2. ørindi verður sungið eftir at prestur hevur messað ella lisið einglasongin av Betlehems fløtum.

Liturgisku ordinariumsliðini (Kyrie, Gloria, Credo, Sanctus og Agnus dei) hvurvu meir ella minni úr føroysku guðstænastuni. Við deknaguðst er vanliga einki av liðunum – onkrasteds hava tey nú, Credo (Trúarjáttan). Tá prestur er, er altíð Credo, men ikki altíð altargongd (sanctus agnus dei). Við sálmabókini 1990 fingu vit Agnus dei-sálmin 380, men hann verður tíverri ikki brúktur í øllum kirkjum.

Altarbók Føroya kirkju (aut 2019) hevur øll ordinariumsliðini frá fornkirkjuni/*Deutsche Messe/Den danske kirkeordinans* við. Danir fingu nýggja altar/ritualbók í 1992. Hon hevur eisini verið brúkt í Føroyum.

Leif Hansen